


*Pól Thorsteinsson, sum her hegnisliga smoyggir sær millum tveir skálamenn, var hesa ferð á vinstra bakki, og spurningurin er so, um hann eisini fer at seta seg á hetta plássið í landsliðshópinum, sum savnast mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skála-NSÍ 0-4 (0-2):

# Klárt til gulldyst í Runavík

**Runavíkingar hildu fast um oddasessin, tá teir vunnu tryggan sigur á Skála í útsetta dystinum mána-kvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Trýstið lág á runavíkingum, tá teir mánakvøldið ferðastu vestur um fjørðin at avgreiða grannauppgerðina móti Skála. Uppgerðin varð útsett ein dag, tá veðrið ikki loyvdi nøkrum fótbóltsspæli sunnudagin, og meðan runavíkingar soleiðis vóru í bíðistøðu, hevði HB nýtt sunnudagin til at leggja seg á odda í bestu deildini.

Tí kendu runavíkingar treytirnar undan dystinum. Bert ein sigur vildi viðføra, at teir vunnu seg aftur á ovastu rók.

### Málið loysti

Og tað var alt fyri eitt greitt, at runavíkingarnir løgdu nógv fyri. Eini grannauppgerð so líkt, so tóktust báðir partar at vera tendraðir frá fyrsta bríksli. Krútið varð ikki spart í nærdystunum, sum vóru nógvir og harðir í tali, og tó at NSÍ hevði eina leikliga yvirvág, so vóru fleiri ábendingar um, at talan væl kundi gerast um eina sera spennandi uppgerð.

Spenningurin helt sær í akkurát 12 minuttir. Tá hevði NSÍ vunnið sær hornaspark í høgru síðu. Sjúrður Jacobsen sendi innfyri, og eftir at stútari móti málinum í fyrstu atløgu miseydnaðist, datt bólturin í aðru atløgu niður til Djóna N. Joensen, sum var avgjørdur og potaði í kassan.

So var NSÍ á odda, og hetta gjørdi, at teimum nú ikki nýttist at leggja so nógv fyri í framrættaða spælinum, men ístaðin kundu royna at koyra bóltin runt, soleiðis at spælið gjørdist meira opið. Fram til hetta høvdu skálamenn nevnliga í stóran mun lagt dentin á eina kompakta verju, fyri síðani at dúva upp á skjót mótálop, men tað sigur seg sjálvt, at við málinum hjá NSÍ versnaðu fyritreytirnar fyri hesum.

Framvegis royndi Skála í stóran mun at halda fast í verjuspælinum, men tað var nú onkursvegna, sum høvdu teir mist trúnna uppá, at tað skuldi lata seg gera at basa runavíkingunum. Sum ein eind arbeiddi liðið nú ikki á sama hátt. Heldur var tað soleiðis, at leikararnir stríddust hvør sær, og tá ber ofta til at spæla seg burtur úr trupulleikunum við bara einum ella tveimum bóltflytingum, og var hetta eisini nakað, sum runavíkingarnir royndu at leggja dent á.

Fleiri ferðir var um reppið, at teir við flytingum í antin breidd ella djúpd spældu Skála-verjuna tunna, og eftir at hava hótt nakrar ferðirnar, eydnaðist tað um miðjan hálvleikin at økja í 2-0. Uppspælið endaði í høgru síðu, har Brynjólvur Nielsen hevði góðar stundir at leggja sær bóltin til rættis. Innleggið lá neyvt í holið millum verju á málverja, har Ulrik Balling kom rennandi, og so hevði danin skotið sítt fimta mál í eins nógvum dystum, síðani hann í summar kom til NSÍ.

### Fall saman

Vóru skálamenn tamir eftir fyrsta NSÍ-málið, so fullu teir mest sum í fátt, nú munurin var øktur. Restina av hálvleikinum stýrdi NSÍ snøgt sagt dystinum, og tað mundi eisini draga skeiva vegin hjá Skála, at Dánajal Hansen nakað seinni var noyddur at fara av vøllinum við einum ísposa um eyma fótliðið, sum hevur plágað hann stóran part av árinum.

Fleiri ferðir var eisini um reppið, at heilt stórir møguleikar spurdust burturúr yvirvágini hjá NSÍ, men mest sum hvørja ferð restaði seinasti neyvleikin.

Ivaleyst høvdu skálamenn nýtt steðgin til at gera av, hvussu teir á bestan hátt kundu avgreiða seinna hálvleik, uttan at verða fullkomuliga úrlætnir, men tað var tó skjótt, at ein týdningarmikil liður í spæliætlan teirra var burtur. Ulrik Balling varð leiktur leysur innanfyri verjuna, og tá hann skuldi lyfta upp um Eugen Voda í málinum, nýtti hesin hendurnar at bjarga við. Hóast heimamenninir ikki vóru samdir, so metti dómarin, at hendingin fór fram uttan fyri brotsteigin, og so var bara ein vegur hjá rumenska málverjanum, og tað var í brúsuna.

Eftirfylgjandi frísparkið sendi Brynjólvur Nielsen beinleiðis í kassan, og so tóktist alt bara vera ein spurningur um, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Tað gjørdist bert til eitt mál afturat, men orsøkin til hetta var so avgjørt ikki, at runavíkingar ikki høvdu møguleikar til fleiri. Serliga Ulrik Balling, sum annars hevur sýnt eitt ræðani máltev, brendi nógv, men hann átti so sín lut í seinasta málinum í dystinum. Staddur høgru megin í brotsteiginum smekkaði hann til. Arnold Berg – sum nú vardi málið - hálvbjargaði royndini, men í aðru atløgu kundi hann bert hyggja at, tá Sjúrður Jacobsen beindi bóltin seinasta pettið í netið.

### Klárt til finalu

Sostatt vann NSÍ ein sannførandi sigur á grannunum av Skála, og við sigrinum vunnu teir seg aftur upp á ovasta sessin á stigatalvuni. Har verða teir so í øllum førum hangandi í 13 dagar, nú frívikuskiftið verður, men eftir landsliðssteðgin er mangt sum bendir á, at talan verður um eina rætta FM-finalu, tá HB kemur á vitjan. Ein dystur, har vinnarin í øllum førum kann fáa nakað, sum líkist einum avgerandi fyrimuni í stríðnum um gullkrónurnar.

Og skal metast eftir dystinum á Skála, so eru runavíkingar til reiðar til stóru avbjóðingina. Í nógv ár hava fleiri av gulu leikarunum verið mettir sum stórtalent, men undir Jógvan Martin Olsen hava fleiri teirra veruliga ment seg, soleiðis at talan hevur verið um støðugt góð avrik. Ikki minst tí liðið í mangar mátar tykist vera eitt sera sterkt kollektiv, har allir arbeiða fyri allar, og nú landsliðsmenninir báðir, Pól Thorsteinsson og Helgi L. Petersen, aftur tykjast vera komnir fyri seg, standur venjarin av álvara við einum positivum trupulleika, tá hann skal gera av, hvørjir leikarar skulu setast á beinkin.

Nei. Einki er at siga til, at fótbóltsfepurin í Runavíkini setir nýggj hitamet fyri hvørt umfarið sum gongur, og tað skal vera løgið, um talan ikki verður um áskoðaramet við Løkln um tvær vikur.

### Dysturin í tølum

**Skála-NSÍ -4 (0-2)**
0-1: Djóni N. Joensen 12
0-2: Ulrik Balling 27
0-3: Brynjolvur Nielsen 49
0-4: Sjúrður Jacobsen 53
Dómari: Páll Augustinussen

Skála: Eugen Voda - Rúni Rasmussen, Pauli Pouslen, Bent Djurhuus, Áki Petersen - Kári Nielsen, Pauli Hansen, Dánial Hansen, Bárður Danielsen - Alexandru Gabor, Alexander Johansen
NSÍ: Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Djoni N. Joensen, Pól Thorsteinsson – Gert Langgaard, Kári Hansen, Ian Højgaard, Sjúrður Jacobsen – Óli Hansen, Ulrik Balling



# Pliktarbeiði hjá KÍ á Mølini

*Hjalgrím Elttør og Ronnie Samuelsen eru hvør í sínum lagi millum drívmegirnar á liðum sínum. Mánakvøldið var tað tó Hjalgrím, sum var hin størri í trygga 4-0 sigrinum hjá KÍ*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




**Eingin ivi var um, hvør parturin hevði størri breidd og tyngd, men tað var ikki fyrrenn í 2. hálvleiki, at sigurin varð rudduliga staðfestur**

EB/STREYMUR–KÍ
*Jóannes Hansen*

KÍ er framvegis væl við í stríðnum um FM heitið, heiðursmerkini og harvið nýggja Europa Cup luttøku. Tað syrgdu klaksvíkingar fyri, tá teir mánakvøldið vunnu 4–0 á Eiði. Talan var um søtan sigur, tí royndirnar seinastu tíggju árini hava ofta víst, at tað eftir Europa Cup ævintýr ikki er lætt at seta seg upp til næsta uppgávuna í landskappingini.

KÍ var í útgávu, ið – sammett við tað, sum mótstøðuliðið hevði at bjóða uppá – var ultra verjukend. Í staðin fyri leikbannaða Allan Joensen var Jan Anderasen á liðnum. Jan er og verður verjuspælari, og harvið hevði KÍ tríggjar spælarar í miðverjuni, meðan heimaliðið bara hevði Jón Sigurd Gleðisheygg í álopinum. Sorin Anghel var ikki við mánakvøldið, og í borðunum vóru Teitur Joensen og Hans Pauli Samuelsen væl meiri miðvallarar enn álopsspælarar.

Atli Danielsen í høgru og Rúni Elttør í vinstru vóru ikki nógv við í álopsmyndingini í 1. hálvleiki, tá KÍ uppstillingin líktist 5–2–3. Hjalgrím Elttør og Jan Joensen arbeiddu nógv og væl á miðvøllinum, meðan tað enn eina ferð sást millum lítið og einki til norska álopsspælaran.

Fyrstu løtuna av seinna umfarinum royndi EB/Streymur, sum undan steðginum hevði havt einar tvær royndir ímóti málinum hjá Meinhardti Joensen, at bjóða av, men bara eina ferð settu teir málverjan á serliga roynd. Annars hevði KÍ miðverjan við sera trygga Aleksander Djordjevic sum álitismanni, gott tak á.

Hesa løtuna hevði KÍ so mikið ilt við at fáa grundspælið, sum teir megna, at hanga saman, at teir ikki settu klaksvíkingin í EB/Streyma málinum upp á serligar royndir.

Sum í eitt nú dystinum ímóti HB í Klaksvík var kenslan, at KÍ við útskiftingum kundi trimma liðið til størri avrik, og soleiðis vísti tað seg eisini at verða. Sum tá EB/Streymur spældi í Runavík næstsíðsta vikuskifti, so sást tað, sum 2. hálvleikur leið, at tað á liðnum eru fleiri, sum sammett við oddaliðini, ið teir takast við, eru dreingir ímóti monnum.

Tá Harley Bertholdsen (avrikini tá hann kemur á vøllin gera, at tað er ófatuligt at tað ikki er pláss fyri honum millum teir fyrstu ellivu) varð settur í høgra borð, og tá so Kurt Mørkøre sjálvur kom í álopið, gjørdist tyngdin og breiddin størri. Og møðin hjá heimaliðnum saman við frísku innskiftingunum hjá KÍ høvdu við sær, at trý mál komu afturat, og at KÍ harvið at enda vann stórsigur.

### Málini

Málið í 1. hálvleiki kom, eftir at Hjalgrím Elttør hevði vunnið fríspark á brotsteigarmarkinum í høgru og átta metrar úr málinum. Heðin á Lakjuni smekkaði til framvið manngarðinum, eitt sindur av aftur og fram stóðst frammanfyri Gunnar á Steig, Pacek setti krúllin undir bóltin ímóti málinum, og dómarin skrásetti Bjarta Vettelstad fyri at vera síðstur á bóltinum. Kanska var tað hann, sum við knænum ella lærinum beindi bóltinum um strikuna.

Heðin á Lakjuni økti til 2–0, tá hann í vinstru hegnisliga tamdi høga diagonalsending frá Harley Bertholsen, kom inn um verjuna og sendi flatt framvið Gunnari á Steig og í handara síðunetið.

Harley Bertholdsen átti nógv í 3–0 málinum. Fyrst steðgaði hann á miðvøllinum mótstøðumonnunum, prikaði fram til Hjalgrím Elttør, sum spældi Kurt Mørkøre í høgru í brotsteiginum. Innleggið varð blokerað til horna. Tað kom innfyri, og eftir eitt sindur av aftur og fram og innlegg aftur úr vinstru, smekkaði Harley Bertholdsen í málið – ikki so ólíkt tá hann skoraði í Klaksvík ímóti HB.

Heðin á Lakjuni staðfesti stutt undan leikloki. Úr brotsteigar samankomingini í vinstru smekkaði hann flatt í handara síðunetið. Sera arbeiðssami Hjalgrím Elttør átti næstsíðsta fótin á. Hann rak fram eftir miðásinum og slepti so til vinstru fyri seg sjálvan.

### Dysturin í tølum:

**EB/Streymur-KÍ 0-4 (0-1)**
0-1: Bjarte Vattelstad
0-2: Heðin á Lakjuni
0-3: Harley Bertholdsen
0-4: Heðin á Lakjuni
Dómari: Petur Skarðenni

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Marni Djurhuus, Andrzej Pacek, Christian Carlsson, Eyðfinn Joensen – Teitur Joensen, Jákup Martin Joensen, Ronnie Samuelsen, Oddvin Zachariassen, Hans Pauli Samuelsen – Jón Sigurd Gleðisheygg
KÍ: Meinhardt Joensen – Atli Danielsen, Ove Nysted, Alexander Djordjevic, Rúni Elttør – Hjalgrím Elttør, Jan Andreasen, Jan Joensen – Allan Mørkøre, Bjarte Vettelstad, Heðin á Lakjuni